VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL
Nr. 239 • týsdagur • 13. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Rúni hevur samráðst fyri 1

**Rúni Bro Róin er 32 ára gamal úr Hoyvík. Hann hevur higartil luttikið í samráðingum fyri 100 milliardir. Í starvinum sum stjóri fyri íløgufígging hjá DONG situr Rúni, við ábyrgd fyri strategisku skipanini av einum av teimum størstu íløgufíggjarætlanunum í Danmark**

FØROYINGAR Í DANMARK
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eg hitti Rúna Bro Róin á høvuðsskrivstovuni hjá DONG í Hørsholm stutt uttan fyri Keypmannahavn. Hann var fryntligur og bjóðaði mær ein góðan bita á skrivstovuni hjá sær, meðan vit prátaðu um starvið sum Head Of Co í DONG, um fyritøkuna og um Rúna sjálvan. Hann leggur fyri við at siga, at hetta er hann, ið úttalar seg vegna Rúna ikki vegna DONG.

DONG er ein risafyritøka, ið hevur Norður Atlantshavið sum eitt av sínum fremstu arbeiðsøkjum, tí ynskir stjórin fyri íløgufígging sjálvandi ikki, at eitt prát við hann skal tolkast, sum almenni politikkurin hjá DONG.

## Læs økonomi

Rúni vaks upp í Hoyvík, gekk í Hoyvíkar skúla og fór síðan í student í Hoydølum. 20 ára gamal fór hann til Århus at lesa búskap.Her gekk sera væl. Á hvørjum ári sendir Århus Universitet seks fólk til Cranfield School Of Management í Onglandi at luttaka í eini eitt árs MBA útbúgving. Tú sleppur at taka tann kreativa helminingin av MBA'ini. Tann teoretiska partin fært tú góðskrivaðan fyri lesturin í Århus. Rúni søkti luttøku og varð valdur út av universitetinum at fara til London. Hetta hevur nøgv at týða fyri starvsmøguleikar í summum londum, sigur Rúni.

Afturkomin til Århus gjørdi hann útbúgvingina í búskapi lidna innan fyri tey ætlaðu fimm árini.

## Í starv hjá TDC

Eftir lokna útbúgving varð hann settur í starv hjá danska telerisanum TDC í Keypmannahavn. Har arbeiddi hann við búskaparligari greining. Men eftir hálvt annað ár hjá TDC, var hann vorðin deildarleiðari. Hann varð verðandi hjá TDC í fýra ár og fekk har royndir við at arbeiða við stórum íløguætlanum. Saman við DONG er TDC ein av teimum fyritøkunum við størstu íløgufíggjarætlaninini í Danmark.

## Headhuntaður

Í 2001 kom fyrrverandi stjórin í danska fíggjarmálaráðnum Anders Eldrup í starv sum stjóri í DONG. Hetta hevði stórar umskipanir í fyritøkuni við sær. Í hesum sambandi varð leitað eftir best egnaðu fólkunum. DONG brúkar sokallaða headhunting, har teir velja best egnaðu fólkini til leys størv og bjóða teimum tey. Sum skilst stóð navnið hjá Rúna á listanum, og hann varð settur í starv við projektleiðslu. Hann fór sostatt úr einum starvið við beinleiðis leiðslu til eitt starv projektleiðslu. Hann gjørdist tó heilt skjótt deildarleiðari í DONG.

## 100 milliardir

Rúni Bro Róin er nú 32 ára gamal. Hann hevur higartil luttikið í samráðingum fyri 100 milliardir, nakrar av samráðingunum eru enn ikki endaliga gjøgnumførdar, men nógvar eru. Størsti einstaki sáttmálin hann hevur samráðst um, var áljóðandi 24 milliardir.. Eg spurdi hann, um peningur ikki missir sítt virði, tá man arbeiðir við so stórum upphæddum. Men tað helt hann ikki "Peningur fær bara ymisk virði. Um tú samráðist um ein sáttmála, sum er 24 milliardir, so hevur peningurin eitt virði, er sáttmálin um eina millión, hevur peningurin eitt annað virði, og tá eg komi til hús, hevur hann eitt heilt triðja virði.", sigur Rúni. Hann heldur tó, at tað er áhugavert, tá tú samráðist um stóru sáttmálarnar, at tú kanst uttan himpr biðja 100-200 fólk koma til arbeiðis, ella fara út og keypa júst tann rætta serfrøðingin til onkra uppgávu.



## Situr við samráðingarborðið

DONG byrjaði fyrst í 1980'unum sum danskt olju- og gassfelag, men virksemið er alsamt vaksið hesi árini, og við íløgum og yvirtøkum bæði í Danmark og í útlandinum er felagið, ið danski staturin eigur, vorðið ein risi, ið millum annað eigur stórar partar av danska elkervinum, stór olju- og gassøki í bæði donskum og útlendskum havøki, umframt nógv annað virksemi innan orku. Felagið hevur skrivstovur í Danmark, Noregi, Svørríki, Týskland, Hollandi og Stóra Bretlandi. Rúni spælir ein virknan leiklut í yvirtøkunum. Deildin hjá honum tekur sær av fíggjarliga partinum og av strategi. Rúni